UTTANRÍKISRÁÐIÐ
MINISTRY OF FOREIGN AFFAIRS

25. mars 2008
Mál: 770-034/08

Føroya Løgting
Uttanlandsnevndin
Stílað til Jenis av Rana, formann
Tinghúsvegur 1-3
100 Tórshavn

Viðvíkjandi innflutningi av rossum

Sum kunnugt hava Føroyar – sambært heilsufrøðiliga sáttmálanum við ES – ikki kunnað innflutt livandi djór úr øðrum londum enn ES londum, umframt londum, sum hava heilsufrøðiligan sáttmála við ES, ið eisini fevnir um livandi djór. Hetta hevur elvt til trupulleikar viðvíkjandi rossainnflutningi úr Íslandi, tí rossini skulu ígjøgnum eina marknaeftirlitsstøð í Danmark ella øðrum ES landi, áðrenn tey koma til Føroya. Tað er bæði kostnaðarmikið og óheppið sæð frá einum djóraheilsusjónarmiði. Føroyar hava tí í longri tíð havt samskifti við ES myndugleikar, fyri at fáa í lag semju við ES um at innflyta livandi ross til Føroya beinleiðis úr Íslandi, eins og eina skipan, sum letur upp fyri, at ross kunnu verða flutt millum Føroyar og ES til eitt nú kappingar. Uttanlandsnevndin varð kunnað um hetta undan felagsnevndarfundinum ES-FO í Brússel í desember 2005.

Nú eru embætisfólk frá báðum pørtum, vorðin samd um at mæla til eina loysn, sum – verður hon góðkend og framd – inniber, at broytingar skulu gerast í felagsnevndaravgerð nr. 1 frá 2001, ið inniheldur neyvari treytirnar fyri heilsufrøðiliga sáttmálanum millum Føroyar og ES. Hesar broytingar hava við sær, at Føroyar binda seg til at seta í verk viðkomandi ES lóggávu. Víst verður til hjálagda uppskot til felagsnevndaravgerð um broytingar í felagnevndaravgerð nr. 1 frá 2001.

Áðrenn eg fari at heimila felagsnevndarformanninum at undirrita avgerðina Føroya vegna, fari eg, samsvarandi grein 54 í stýrisskipan Føroya, við hesum at ráðføra meg við uttanlandsnevnd løgtingsins.

Vinarligar heilsanir

Høgni Hoydal
Høgni Hoydal
landsstýrismaður

28. MAR. 2008